# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 23.01.2025 |
| Mál nr.: | 24/18551 |
| Málsviðgjørt: | JEK |
| Ummælistíð: | 23.01.-07.02.2025 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**
(Skatting av húsaleigu)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 153 frá 19. desember 2023, verður § 8 a, stk. 1 orðað soleiðis:
"Inntøka, ið stavar frá útleigan av húsum o.tíl. til bústað, sbr. § 1 í leigulógini, verður bruttoskattað við 25%. Bert tann parturin av inntøkuni, sum fer upp um kr. 100.000 kr. verður skattaður. Eiga persónar í felag hús o.tíl., er samlaði frádrátturin eftir hesum stykki kr. 100.000. Avgerðin um at brúka hetta stykki ávikavist stk. 2 er bindandi fyri trý ár í senn. Leiguinntøka, skattað eftir hesum stykki, verður ikki tikin við í skattagrundarlagið í § 1. Skatturin sbrt. 1. pkt. fer 100% til atvinnukommununa."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Við uppskotinum verður býtið av bruttoskattin frá húsaleigu broytt soleiðis, at allur skatturin frá húsaleigu fer til atvinnukommununa, t.v.s. komununa, har húsið er staðsett.

Uppskotið er sambært samgonguskjalinum og eftir ynski frá Kommunufelag Føroya.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi reglum verður skatturin frá húsaleigu býttur við 55% til land og 45% til atvinnukommununa.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at lata atvinnukommununi allan skattin frá útleigan og at gera tað lættari hjá fólki at gera inntøkuna upp skattliga.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður § 8 a, stk. 1 broytt, soleiðis at allur skatturin frá húsaleigu fer til atvinnukommununa.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Kommunufelagnum, Vinnuhúsinum, TAKS og Felagnum Føroyskir Grannskoðarar.

Uppskotið hevur harumframt verið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Fyri landið merkir uppskotið ein inntøkumiss við tað at farið verður frá einari skipan, har skatturin frá húsaleigu verður býttur millum land og kommunur til eina skipan, har allur skatturin fer til atvinnukommununa.

Árligi inntøkumissurin fyri landið orsakað av, at allur skatturin framyvir fer til atvinnukommununa verður mettur at vera 1.700.000 kr.

Fyri kommunurnar merkir uppskotið ein árligan inntøkuvøkstur við tað, at farið verður frá einari skipan, har skatturin frá húsaleigu verður býttur við 45% til avvarðandi kommunu og 55% til landskassan til eina skipan, har allur skatturin fer til atvinnukommununa. Inntøkuvøksturin verður mettur at vera 1.700.000 kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur størri umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður, at uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri smærri kommunurnar, har virksemið og skattainntøkurnar helst fara at økjast.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki kendir millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið samsvarar við Hoyvíkssáttmálan (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), Evropeiska mannarættindasáttmálan, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske

menneskerettighedskonvention, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Talan er um eitt skattauppskot.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Broytingin ber í sær, at allur skatturin frá útleigan til bústað eftir bruttoháttinum framyvir fer til atvinukommununa, t.v.s. kommununa har ognin er staðsett.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu

Fíggjarmálaráðið, 23. januar 2025

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason